# KOM Í NEYÐ AV FLÚGVANDI BORÐISKI

HANN **ÆTLAÐI** SÆR IKKI AT **KRÓGVA** SEG BURTUR Á EINI **BALKONG**, TÁ IÐ HANN SUM **16** ÁRA GAMAL **SPÆLDI** ALMENT **FYRSTU** FERÐ. HANSARA **RINGASTA** UPPLIVILSI Í **UNDIRHALDI** VAR, TÁ IÐ HANN **FORTALDI** EINA SØGU UM **JÓL** Í EINUM **FLÚGVANDI** BORÐISKI, OG HANN ER **VÆL** NØGDUR VIÐ, AT **TÓNLEIKUR** OG **UNDIRHALD** IKKI **GJØRDUST** TIL MEIRA ENN EITT **ÍTRIV** Í HANSARA **LÍVI**. VIT HAVA HITT **ROBERT MCBIRNIE**, SUM HEVUR UNDIRHILDIÐ **FØROYINGUM** Í MEIRA ENN **50** ÁR



**INTERVIEW**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Í mínum eygum sær hann út, sum hann altíð hevur gjørt. Ungdómligur og blíður, nú hann tekur ímóti mær heima í Eiriksgøtu í Havn. Hann hevur júst rundað tey 67 árini - vágbingurin, sum flestu føroyingar kenna sum sangara og undirhaldara. Og tað sæst ikki á honum – altso aldurin.

Hann er Robert McBirnie – hann er ikki sum hini, og eingin er sum hann.

Sum 16 ára gamal gjørdist hann poppsangari í Vági, síðani legði hann landið niður sum oddamaður í Faroe Boys, og sum um tað ikki var nóg mikið, so fekk Ísland sama túr.

Seinnu nógvu árini hevur hann skemtað, sungið og undirhaldið kring landið alt og í útvarpi, og meðan pensióneraðir lærarar vanliga fara í havan at lúka ókrút ella fara flótandi á flot, so brúkar Robert McBirnie sítt otium sum undirhaldari.

Og hóast hann hevur undihildið føroyingum í meira enn hálva øld, hevur hann ongar ætlanir um at gevast við tí fyribils – og hann er longu bókaður til tiltøk eitt ár fram.

### Tóku stig fult út

Tað var upp undir jól í 1959, og at Robert McBirnie fyrstu ferð steig á pall á almennum tiltaki. Tað var heima í Vági, hagar nýggju poppvindarnir við gittarspæli og sangi eisini vóru komnir. Tað hevði verið nógvur tónleikur í Vági, men valið stóð fyri tað mesta millum harmonikkutónleik ella jazz.

Líka til hetta vetrarkvøldið í 1959, tá ið Robert og vinmenninir í bólkinum undir at spæla. Stillaðu okkum undir balkongini. Tá ið fólk so komu at lurta, skiltu tey als ikki, hvat tað var, sum gekk fyri seg. Tey stóðu bara og hugdu at okkum, meðan vit spældu teir 10 sangirnar, sum vit dugdu. Tá ið vit vóru lidnir við teir, var ikki annað at gera, enn at byrja av nýggjum upp á sangirnar, og vit máttu líkasum siga við fólk, at tey vóru væl komin at dansa til tónleikin hjá okkum. Hetta var so fremm-

> **Ег minnist bara einaferð, at tað fullkomiliga kiksaði hjá mær, tá ið eg skuldi undirhalda**

Red Boys gjørdu álvara av ætlanini um at spæla popptónleik fyri vágbingum. Framførslan var í Losjuni í Vági, har fólk vóru von við at verða undirhildin av harmonikkutónleiki. Teir, sum spældu harmonikku, sótu vanliga uppi á eini balkong, og tað var ikki meira, enn at dansifólki sá í skallan á tónleikarunum, sum spældu fyri teimum.

Soleiðis vildu Robert og teir ikki framføra. Teir tóku stigi fult út – upp á almennan pall, men ikki upp á nakra balkong.

– Vit vóru so frekir, at vit fóru niður ant fyri tey, at tey vistu ikki, hvussu tey skuldu fyrihalda seg til tónleikin, men so byrjaðu tey at dansa, greiðir Robert McBirnie frá.

Útgerðin til framførsluna var beskeðin. Víst høvdu teir ljóðføri og slagverk, men forsterkarar og ljóðanlegg vóru so at siga ikki uppfunnin her á landi tá. Sangmikrofonina hongdu teir niður úr loftinum og settu hana í ein bandupptakara, sum kundi forstyrkja ljóðið nakað. Ein gittari varð settur til eitt Philips radio, sum Robert hevði stolið frá foreldrunum til framførsluna. Tað var tað – og tað var fínt. Red Boys spældu og undirhildu, og teir settu lív í Vágs bygd við popptónleiki.

### Børn róptu »te-vatn og breyð«

Tað var sum sangari í Faroe Boys, at Robert McBirnie av álvara gjørdist landskendur og idoliseraður. Hann kom við í bólkin, eftir at hann flutti norður til Havnar at búgva, og upplagdi undirhaldarin kom sum kallaður, tí bólkurin manglaði sangara um tað mundið.

Faroe Boys gjørdust tað stóra navnið í føroyskum poppi í sekstiárunum, og Robert var sjálvsagt mitt í meldrinum.

– Vit vóru populerir, men eg haldi ikki, at tað var so øgiliga ógvusligt í Føroyum. Tað var eitt sindur meira í Íslandi, men tað var ikki nakað hysterí, sum teir stóru altjóða bólkarnir upplivdu. Tá ið plátan hjá Faroe Boys kom út síðst í 60'unum, var eg lærari í Klaksvík, og tá kom tað fyri, at onkur skúlabørn krógvaðu seg aftan fyri ein húsavegg og róptu »te-vatn og breyð« eftir mær, sigur Robert.

Faroe Boys fekk av álvara fótin fyri seg í høvuðsstaðnum, tá ið teir fóru at spæla til dans í Tórshøll sunnukvøld. Boð vórðu síðani eftir bólkinum úr

▶